# Lisbeth L. Petersen: Nú er fjáltur komin á politikarar

**Orsøkin til at føroyskir politikarar taka so ógvusliga til orðanna ímóti ráðstevnuni hjá Norðuratlantsbólkinum, er, at fjáltur er komin á teir, heldur Lisbeth L. Petersen, fólkatingslimur úr sambandsflokkinum**

RÍKISFELAGSSKAPURIN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Nú er rættiligur fjáltur við at koma á føroyskar politikarar.

Tað sigur annar føroyski fólkatingslimurin, Lisbeth L. Petersen.

Í kjalarvørrinum á umstríddu ráðstevnuni hjá Norðuratlantsbólkinum í Keypmannahavn, hava fleiri politikarar, eisini løgmaður og landsstýrismenn, skuldsett norðuratlantsbólkin fyri at øsa danir upp ímóti føroyingum og fyri at taka grundarlagið undan eini avtalu frá 1998 ímillum Føroyar og Danmark, har tað verður staðfest, at tað er landsstýrið, sum hevur ábyrgdina av fíggjarpolitikkinum í Føroyum.

Hetta eru hørð orð. Atfinningarnar eru so harðar, at tað eru enntá tey, sum siga seg verða skelkað av teimum hørðu viðmerkingum, sum eru falnar.

– Men eg haldi, at hetta er ein avleiðing av, at fjáltur er komin á politikarar.

Og tað heldur Lisbeth L. Petersen ikki vera so løgið, tí sporini ræða.

– Tað er væl skiuljandi, at fjáltur er komin á føroyskar politikarar. Teir minnast, hvussu vánalig viðurskifti vóru ímillum føroyingar og danir upp ígjøgnum tað mesta av nítiarunum.

– Hesi seinastu árini hevur friður verið og viðurskiftini ímillum Føroyar og Danmark hava verið góð.

– Men nú eru danskir politikarar aftur farnir at røra í pottinum í sambandi við blokkstuðulin og tað eru enntá teir, sum krevja, at blokkurin til Føroya verður endurskoðaður.

Danir eru eisini farnir at fýlast á føroyskan skattapolitikk og tann frádrátt, sum fiskimenn fáa.

Lisbeth L. Petersen heldur, at føroyskir politikarar stúra fyri, at hetta er byrjanin til eitt nýtt stríð ímillum Føroyar od Danmark.

– Serliga nú tíðirnar eru farnar at versna aftur, stúra føroyskir politikarar fyri, at danir fara at skerja blokkin at og leggja seg út í føroysk viðurskifti og tað kann vera til stóran skaða fyri føroyskan búskap.

Og tað ræðast teir, tí taka teir so ógvusliga til orðanna ímóti ráðstevuni, heldur hon.

– Skera danir blokkin, ella taka hann heilt av, skal nógv til, áðrenn teir fara at hækka hann aftur og tí eru føroyskir politikarar blivnir nervøsir av tí, sum er ført fram í Danmark í kjalarvørrinum á ráðstevnuni hjá Norðuratlantsbólkinum, sigur Lisbeth Petersen.



*Í kjalarvørrinum á ráðstevnuni hjá norðuratlantsbólkinum sita danskir politikarar eftir við eini fatan av, at blokkurin er ein vansi fyri føroyskan búskap og tað er sera óheppið, sigur Lisbeth L. Petersen, fólkatingslimur*

### Óheppið

Tí Lisbeth Petersen eisini, at ráðstevnan í Keypmannahavn var óheppin.

– À hesi ráðstevnuni fingu danir at vita frá føroyskum serfrøðingum, at stórur vandi er furi, at blokkurin hita búskapin.

– Og tað er skaðiligt at hita búskapin.

Ì kjakinum, sum hevur tikið seg upp í kjalarvørrinum á rástevnuni, hava vilja danskir politikarar hava blokkin til Føroyar endurskoðaðan.

Hetta heldur Lisbeth L. Petersen vera eina reaktión, sum er væl skiljandi.

– Útfrá tí, sum varð ført fram á ráðstevnuni, er reaktiónin frá donskum politikarum púra natúrlig.

– Teir vilja treyðugt gera støðuna í Føroyum verri enn hon er og tí er tað ein púra natúrlig reaktión hjá einum donskum politikara, sum fær at vita, at hann sendir eina milliard um árið til Føroya, sum kanska er við til at skaða føroyskan búskap.

Sjálvur blokkstuðulin er góðar 600 milliónir, men harafturat batala danir eisini løgreglu og dómsvald, so tilsamans betala danir eina milliard til Føroya um árið.

– Men Lisbeth L. Petersen sigur eisini, at sum føroyingur er hon eisini kedd av at síggja, hvussu illa viðfarnir, føroyingar verða í summum av teimum blaðgreinum, sum hava verið í Berlingske Tidende í kjalarvørrinum á ráðstevnuni.

– Har verður ein ógvuliga negativ mynd málað av føroyingum. Har verða Føroyar skýrdar sum eitt skattaparadís, frádrátturin til fiskimenn verður kallaður ein gávubúð og inntøkurnar hjá fiskimonnum verða nevndar ein órímilig lønarveitsla.

Tí heldur Lisbeth. L. Petersen samanumtikið, at tað var stak óheppið at halda eina ráðstevnu sum hesa í Keypmannahavn.

– Men endamálið hjá Norðuratlantsbólkinum er at fáa loysing frá Danmark. Hetta er greiða endamálið hjá bólkinum, hóast Høgni Hoydal átti at vita, at loysingarvongurin í føroyskum politikki hevur mist meirilutan.

– Og ein máti hjá bólkinum at fáa sín boðskap fram, er at skipa fyri ráðstevnum. Og tað sigur seg sjálvt, at teir fara ikki at halda eina ráðstevnu, sum gongur ímóti teirra endamáli.

# Bara ein trygg inntøka í einum ótryggum búskapi

**Hjá føroyingum er blokkurin einasta trygga inntøkan í einum ótryggum búskapi, segði Lisbeth L. Petersen, fólkatingslimir í orðaskifti á Fólkatingi, har hon eisini umrøddi umstríddu ráðstevnuna hjá norðuratlantsblokkinum**

RÍKISFELAGSSKAPURIN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Eftir ráðstevnuni hjá Atlantsblokkinum at døma, hava føroyingar ikki brúk fyri blokkinum úr Danmark. Tvørturímóti er hann skaðiligur og ein orsøk til, at føroyski búskapurin fer upp á kók.

Í orðaskiftinum, sum var á Fólkatingi nú ein dagin, segði Lisbeth Petersen, at danir sótu eftir við teirri fatan, at føroyingar misbrúktu tey fíggjarligu rættindi, vit høvdu frá danska statinum.

– Aftaná slíkan boðskap, er tað sjálvsagt, at danskir politikarar gera vart við seg og vilja hava broytingar.

Lisbeth Petersen sigur, at hetta er ein linja, sum er í fullum samsvari við politikkin hjá undanfarna landsstýri og har allir miðlar vórðu brúktir fyri at vísa á alt tað negativa við ríkisfelagsskapinum,

Men hon gjørdi samstundis vart við, at hetta er ikki áskoðanin hjá hesum landsstýrinum.

– Í ríkisfelagsskapinum hava vit rættindi, sum vit ikki skulu misbrúka, men brúka á forsvarligan hátt.

– Tí skulu komandi samráðingarnar ímillum Føroyar og Danmark um blokkin byggja á á veruleikan – og blokkurin er ein samráðingarspurningur.

### Elvt til stórar trupulleikar

Lisbeth L. Petersen vísti á, at tað hevði elvt til stórar trupulleikar í Føroyum, at undanfarna landsstýrið skerdi blokkin 367 milliónir um árið.

– Fyri fyrstu ferð í fleiri ár, er hall á fíggjarlógini.

Hon segði, at annars at eftir ráðstevnuna hjá norðuratlantsbólkinum, høvdu nógv fingið tað fatan, at føroyski búskapurin var ov heitur. Men hesum var hon alt annað enn samd um og hon vísti á fleiri viðurskifti, sum skuldi vísa á tað øvugta.

- Húsaprísirnir í Havn standa í stað, men úti um landið eru teir fallandi.
- Arbeiðsloysið í Føroyum veksur skjótt og útgjaldið hjá ALS er hækkað.
- meiri enn 50% hetta seinasta árið. Og útgjaldið úr fiskavirkisskipanini hjá ALS er hækkað næstan 100%.
- Alivinnan skuldi geva okkum eitt bein at standa á afturat fiskivinnuni, men alivinnan er í svárari kreppu.
- Føroyska fiskivinnan stendur seg sum heild illa og partar av fiskiflotanum eru beinleiðis hóttir.

– Sostatt er blokkurin einasta trygga inntøkan í einum ógvuliga ótrygum búskapi – og sostatt er blokkurin heldur ikki so einfalt mál at loysa í einum sera viðbreknum búskapi, sum bara hevur eitt bein at standa á, segði Lisbeth Petersen á fólkatingi.



*Komandi samráðingarnar um blokkin skulu byggja á veruleikan og ikki á boðskapin um, at hann er ein ríkisveiting, sum vit misbrúka, segði Lisbeth Petersen á Fólkatingi*



# Nú verður keiøkið stongt

**Keitúrarnir hjá mongum havnarborgarum fara nú í søguna. Hetta kemur av altjóða reglum, sum siga, at atløguøkið hjá ferðafólka- og farmaskipum, sum koma úr útlondum, skulu stongjast. Eingin óviðkomandi skal sleppa til økið, og grundgevingin er óttin fyri yvirgangi**



*Mynd: Jens Kristian Vang*

HAVNALAG
*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin*

– 1. juli koma reglurnar í gildi, so nakrar dagar áðrenn tað, fara vit at avbyrgja keiøkið. Tað sigur Jónsvein Lamhauge, stjóri á Havnaskrivstovnuni. Reglurnar siga, at øll ferðafólka- og farmaskip, sum eru yvir 500 bruttotons, skulu verða óatkomilig hjá ørindaleysum. Vestara vág verður stongd, tá ið skip liggja, annars verður hon opin.

Men av tí, at tað stendur so nógvur farmur á keiøkinum og út eftir molanum, verður hetta økið stongt av permanent. Eystara bryggja verður umgyrd av einum høgum hegni. Eitt portur verður sett í, har vaktarhald fer at vera tá trafikkurin er mestur, t.v.s. gerandisdagar, tá fólk er til arbeiðis úti á økinum og tá skip leggja at ella fara.

– Ørindaleys sleppa ikki út á økið longur. Hevur tú eitt ørindi har úti, mást tú tosa við vaktina, um at sleppa inn, og tá mást tú kunna vísa á hvørji tíni ørindi eru.

Hevur tú ørindi uttan fyri mest trafikkeraðu tíðina, t.v.s. tá eingin vakt situr við portrið, mást tú ringja til vakthavandi hjá Tórshavnar Havn, og so metur hann um, hvørt ørindini eru nóg átroðkandi til, at hann skal koma oman at læsa upp, greiðir Jónsvein Lamhauge frá. Tey, ið arbeiða har úti fáa eitt kort, sum tey skulu draga ígjøgnum eina sleðu, so portrið fer upp.

Jónsvein sigur víðari, at hetta er nakað, ið liggur uttan fyri ávirkanina hjá Tórshavnar Havn.

– Hetta eru altjóða reglur, ið koma frá IMO, ið merkir International Maritime Organisation. Tað er ein felagsskapur, ið setur øll krøv hvat viðvíkur sjógvi, sigling og skipum. Um vit ikki fylgja hesum reglunum, kann tað fáa álvarsamar fylgjur, sigur hann.

– Um t.d. Blikur leggur at hjá okkum, og vit ikki lúka øll altjóða krøv, so kann skiparin á Bliki vænta, at hann ikki sleppur at leggja at í næstu havn, hann kemur til. Havnafútin har kann nevniliga nokta skipum at leggja at, um hann sær, at tey koma frá eini havn, ið ikki hevur hesar altjóða trygdarreglurnar í gildi, greiðir Jónsvein frá.

– So um vit slaka á hesum økinum, kann tað fáa álvarsamar fylgjur fyri alt samfelagið. Tað fer sjálvsagt at ávirka inn- og útflutningin munandi, um farmaskip okkara ikki sleppa at leggja at.

Hann sigur tó, at tað ikki bert eru havnirnar, ið koma at merkja munin. Eisini skipini koma undir hetta nýggja trygdartiltakið. 1. juli skulu øll farma- og ferðafólkaskip vera uppdaterað.

### Suðringar merkja munin

Onkuntíð leggur Smyril at heilt úti á molanum, t.d. tá Norrøna liggur við kei. Higartil hava fólk kunna koyrt ella spákað út til skipið, men tað verður nú broytt.

– Bilar, sum skulu við Smyrli, sleppa at koyra út á molan undir strongum eftirliti. Tey, ið ikki hava bil, verða nú noydd at koma á Farstøðina, og so koyra út á molan við einum bussi, ið verður settur inn til endamálið. Og tá Smyril leggur at, verður tað sjálvandi á sama hátt, at ein bussur stendur og bíðar tá lagt verður at. Hann koyrir so øll, ið ikki hava bil inn á Farstøðina. Um fólk koma at taka ímóti ferðafólki við Smyrli, eru tey noydd at bíða á Farstøðini eftir hesum góða bussi, sigur Jónsvein.

– Hetta verður sama skipan, sum vit kenna frá teimum størru flogvøllunum, greiðir hann frá.

Hann sigur, at teir á Havnaskrivstovuni frøðast um, at hesar reglur nú koma í gildi, tí keiøkið er eitt vandamikið økið at vera á.

– Tað er eitt arbeiðsøkið, við stórum byngjum og nógvum farmi. Tað er avgjørt ikki heilt vandaleyst hjá óviðkomandi at ganga og mala har úti. So við hesum reglunum fáa vit endiliga bast tí trupulleikanum og óttanum fyri vanlukkum, sigur hann.

### Kappróðurin

Nógv eru tey, ið tó ikki eru so fegin um avgerðina at steingja molan. Har er dagliga nógvur trafikkur, serliga í hesum tíðum, nú kappróðurin er í gongd. Hvørt kvøld eru nógvir bilar og hyggja hvussu gongst ymsu bátunum undir venjing. Hetta verður eftir 1. juli av ongum.

– Á ólavsøku verður loyvt at fara inn á keiøkið undir kappróðrinum, tó verður tað undir strongum eftirliti. Vit fara at hava vaktir allastaðni, sum tryggja, at fólk ikki fara malandi nakrastaðni, sum tey ikki skulu vera. Tey sleppa at vera framvið keikantinum sjálvum, men største partur av keiini verður tó framvegis stongdur, staðfestir hann.

Nýggja skipanin skal vera komin í gildi 1. juli, men sum nevnt fara teir at seta hegnini upp nakað fyri tað. Við hesum fer ein gamal býarsiður í søguna, so nú er at njóta túrarnar út á molan, meðan til ber.

